

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 04 - 2012

# Føroyskir handverkarar gera oljupall kláran

Norskir oljumyndugleikar hava góðtikið kinesiska boripallin Cosl Innovater til at arbeiða í norskum sjógvi. Nú er so bert eftir hjá Statoil, sum hevur langtíðarleigað pallin, at góðkenna hann. Hetta hendir eftir at einir 18 føroyskir eletrikarar og rørsmiðir nú í nakrar mánaðir saman við øðrum hava arbeitt umborð á pallinum á leiðini úr Kina til Noregs. Tað var fyrr í ár, at føroyskir handverkarar í einum samstarvi millum Pam Offshore í Havn og norsku skipasmiðjuna Westcon vórðu settir uppá uppgávuna og fóru til Kina fyri síðani at arbeiða umborð ta longu leiðina til Las Palmas og seinni til Noregs. Nú hevur pallurin ligið í norskari havn í ein mánað og fer alt arbeiðið at vera liðugt um eina ella tveir mánaðir. Ì løtuni eru handverkarar frá bæði Pam Offshore og Faroe Offshore Service á Skála umborð á Cosl Innovater. Oljan.fo skilur, at tað hevur gingið væl hjá føroysku handverkarunum at gera arbeiðið og hava teir loyst uppgávunar umborð á pallinum, meðan hann sigldi úr Kina til Europa, til eitt ug. Cosl Innovater er systurpallur til Cosl Pioneer, sum fer at bora á føroyska landgrunninum í summar. Hetta eru teir fyrstu av hesum slagnum av boripallum, sokallaðir semi-submersible, sum verða byrgdir í Kina til brúk á norska landgrunninum. Og tveir aðrir eru á veg. Cosl Pioneer kann arbeiða á upp til 500 metra dýpi, meðan Cosl Innovater kann bora á upp til 750 metra dýpi.